# **Dreymahúsið** hjá Mariann í Royal

Fyri tveimum árum síðan keyptu Mariann Ivandsdóttir og Rúni Brimvík eini heilt vanlig, føroysk hús uppi Millum Gilja. Síðan tey fluttu inn í 2007 er heilt nógv gjørt við tey, og inni í umvælda húsinum kann ein finna alt frá tráðleysum streymi, fitnessrúmi og flatskíggjar í hvørjum rúmi – eisini í brúsuni!



Eg havi ongan hóming av, hvat tað eru fyri eini hús, eg skjótt skal inn í, tá eg parkeri bilin framman fyri húsinum á Jóansgøtu 11.

Húsini, ið eru bygd í 2000, tykjast at vera eini heilt vanlig, føroysk hús í tveimum hæddum. Men longu tá eg komi inn forstovuna, er tað greitt, at húsið kanska ikki er heilt so vanligt kortini.

Í opna skápinum úr beton, málað við hvítari betonmáling, hanga pelsfrakkar og stillettir, og flottir harraskógvar standa pent á hillunum. Mariann rópar, at skal bara fara inn. Eg fari víðari inn í eina størri gongd. Her standa tveir ljósir Paarman stólar frá Casa í tveimum ymiskum sniðum. Á vegginum rundan um trappuna, ið gongur oman í kjallaran, hanga fýra málningar hjá Tróndi Paturssyni, og tveir bláir glasfuglar eftir sama listamann hanga uppi undir loftinum. Gólvið er úr hvíttlakeraðum eiki, og hetta gongur aftur í meginpartinum av húsinum.







### Espressomaskinan tendrar sjálv

Mariann kemur úr vesinum við vátum hári. Hon bjóðar vælkomin og heldur, at tað er ordiliga stuttligt, at Rákið ger eina frásøgn um teirra heim. Vit fara inn í køkin, har hon ger mær eina kaffe latté úr einari heilt serligari espressumaskinu.

– Rúni hevur innstillað maskinuna til at tendra hvønn morgun klokkan sjey, so hon er klár, tá vit koma upp um morgunin, sigur Mariann, sum er eigari av hárfríðkanarstovunum, Royal, í Tórshavn og í Vestmanna. Spurd, nær tey fara upp, flennir hon og sigur, at tímir hon ikki at avdúka. Tá café latté er bryggjað, vísir hon mær køkin. Upprunaliga var hann úr træi, men tey hava málað hann hvítan og sett spotlights upp undir øll elementini, sum lýsa niður í svørtu, blonku flísarnar á gólvinum. Uppiyvir hongur ein flatskíggi.

– Tað er so ræðuliga deiligt at kunna hyggja í sjónvarp, meðan man ger mat. So noyðist man ikki at leypa inn í stovuna fyri at hygggja eftir Degi og Viku, sigur Mariann.

Yvir av køkinum eru stór vindeygu, og har sita tey bæði, Mariann og Rúni, ofta við høga spísiborðið og njóta útsýnið.

- Útsýnið hevur ótrúliga nógv at siga fyri okkum, greiðir Mariann frá.

### Brúsa við flatskíggja

Mariann vísur mær sovikamarið. Ein stór dupultsong við svørtum teppi og einari rúgvu av pyntupútum stendur út frá vegginum mitt í rúminum. Yvirav songini hongur ein 42 tumma flat-